# Havnar Róðrarfelag er mítt hjartabarn

**ÓSKIL** Maðurin, sum er dømdur fyri at hava snýtt Havnar Róðrarfelag, sigur, at felagið er hansara hjartabarn, sum hann aldrin kundi funnið upp á at gjørt fortreð

Áki Bertholdsen

- Havnar Róðrarfelag er mítt hjartabarn og eg vil tí bara alt gott.

Heilt til tað síðsta noktaði ein fyrrverandi nevndarlimur í Havnar Róðrarfelag fyri, at hann nakrantíð hevur tikið eitt einasta oyra frá felagnum.

Hann var nevndarlimur í felagnum í fleiri ár og eitt, hann fekk ábyrgdina, var at leiga felagshølini út til veitslur og tiltøk og hann arbeiddi eisini nógv fyri at útvega felagnum fíggjarligar stuðlar.

Í hesum sambandi stovnaði hann kontu í Eik, har leiga fyri hølini og stuðul til felagið frá ymsum fyritøkum varð goldin inn á.

Sambært ákæranum segði hann ikki hinum nevndarlimunum frá, at hann hevði stovnað hesa kontuna. Og síðani bleiv hann harafturat ákærdur fyri at hava drenað kontuna niður í sín egna lumma

## Ov lítið skil á

Maðurin segði, at hann var noyddur at stovna kontuna, tí Róðrarfelagið hevði so nógvar kontur og eftir hansara tykki var ov lítið skil á, hvussu tær vóru brúktar.

Sambært honum var arbeiðslagið í nevndini eisini blivið sera vánaligt.

- Tað var kríggj ímillum nevndarlimirnar, segði hann.

Tí vildi hann hava sína egnu kontu, sum hann kundi hava skil á sjálvur.

Kontan hevði bústað í eini postsmogu, hann átti privat og hann mintist ikki, at hann hevði fortalt hinum nevndarlimunum, at kontan varð stovnað.

Men tað var ongin ivi um, at tey høvdu tosað um tað í nevndini frammanundan.

Tann stóri trupulleikin hjá tí ákærda er, at allur peningurin, sum er farin av kontuni, er tikin úr kontant og hann kann ikki prógva við skjølum, hvat hann er brúktur til.

Sjálvur tvíheldur maðurin um, at hvørt oyra at farið til ymsar ábøtur og til onnur endamál í felagnum.

Eitt nú hevur hann goldið handverkarum av ymsum slagi fyri ymisk arbeiði, teir hava gjørt í felagnum. Hann hevði somuleiðis goldið fyri herverk, sum varð framt í onkrum veitslu.

Nokk so fitt av øllum hesum peninginum var goldið svart.

Men hann segði, at peningur varð eisini goldin inn á aðrar kontur hjá felagnum.

## Øll skjøl horvin

Men tað ber ikki til at fara í gerðabókina at fáa prógv fyri hesi samtyktini, tí hon er horvin.

Annars hevði hann upprunaliga havt skjøl og kvittanir fyri alt, hann hevði goldið út, eisini fyri tað, sum varð goldið svart, men eisini tey pappírini vóru stolin úr eini skuffu á skrivstovuni í Róðrarneystinum.

Hann segði, at tað var enntá so groft, at eisini privat skjøl hjá honum vórðu horvin.

Í frágreiðing síni í rættinum var tann ákærdi maðurin púra vísur í, at talan var um persónsforfylging við tí endamáli at skúgva hann heilt úr Havnar Róðrarfelag.

- Øll sakin, sum hon er, er ein avleiðing av hesum persónskríggi, sum var ímillum nevndarlimirnar, legði hann afturat.

Hann heldur, at hetta er orsøkin til, at hann varð meldaður og hetta var eisini orsøkin til, at bæði gerðabókin og skjølini burturbeind fyri ordiliga at fáa skovlina undir hann.

*aki@sosialurin.fo*


## Trý størv í City

**Vit søknast eftir trimum fólkum at hjálpa okkum við at veita tí bestu tænastuna til kundar okkara.**

**Størvini**
Hjá City í Runavík er eitt hálvtíðarstarv í nýggja handlinum leyst at søkja. Tú fert at taka tær av skrivstovumarknaðinum, ið kemur at húsast á aðru hædd í nýggju og snotiligu hølum okkara.

Ordramóttøkan hjá City í Havn sóknast eftir tveimum fólkum at vera okkara positiva rødd í telefonini. Tvey størv eru leys at søkja, eitt tíðaravmarkað avloysarastarv og eitt fulltíðarstarv.

Sum partur av ordramóttøkuni hjá City fert tú primert at avgreiða telefonfyrispurningar, veita ráðgeving, ordraavgreiðslu, bíleggja vørur og aðrar fyrifallandi uppgávur í City.

**Forvitin?**
Vilt tú vita meira um eitt av størvunum, ert tú vælkomin seta teg í samband við Tonny Brimsvík, leiðara í City, á tel. 347 314 ella á tbr@city.fo

**Umsóknir**
Umsóknir kunnu sendast við vanligum brævi til City, HR-deildin, Postboks 109, 110 Tórshavn ella við teldubrævi til hrdeildin@nema.fo.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

city
www.city.fo


# Snýtti H Róðrarf 232.000

Áki Bertholdsen

- Eg veit at eg havi gjørt nakað skeivt. Men eg havi ikki stungið eitt oyra í mín egna lumma.

Ein fyrrverandi nevndarlimur í Havnar Róðrarfelag hevur nú í eini tvey ár av øllum alvi roynt at verja seg í rættinum, har hann stóð ákærdur fyri at hava stungið stórar peningaupphædir av eini bankabók hjá Havnar Róðrarfelag í sín egna lumma.

Men allar royndir vóru til fánýtis. Tí hóast hann bedýraði upp á, at hann ikki hevði tikið eitt oyra, kundi hann heldur ikki vísa nøkur skjøl ella onnur prógv fyri, hvat hann so hevði brúkt pengarnar til.

Málið hevur verið rættiliga leingi ávegis og tað eru nú eini tvey ár síðani at tað var reist.

Men ein orsøk til, at málið hevur drigið út, er, at dómarin hevur givið ákærda manninum fleiri møguleikar at finna fram skjøl, sum kundi prógva, at hann hevði brúkt pengarnar til at betala rokningar hjá Havnar Róðrarfelagi, og ikki, sum ákærin segði, hevði stungið teir í sín egna lumma.

Men tað hevur maðurin ongantíð megnað og nú var komið hartil, at Føroya Rættur helt, at nú var nóg mikið drálað og at málið skuldi avgreiðast.

## Skal betala 232.000 krónur

Og týsdagin kom dómarin í Føroya Rætti sostatt til ta greiðu niðurstøðu, at ongin ivi var um, at forkláringin hjá manninum skuldi skúgvast til viks.

Upprunaliga varð hann ákærdur fyri at hava snýtt Havnar Róðrarfelag fyri 275.000 krónur, men nakað er afturgoldið og nakað er sett inn á aðrar kontur hjá felagnum.



Avleiðingin er, at hann varð dømdur fyri at hava snýtt Havnar Róðrarfelag fyri 232.000 krónur og teir pengarnar skal hann betala felagnum aftur í seinasta lagi

**»» Tað var eitt beiskt persónsstríð í Havnar Róðrarfelag**